Uppskot til semju millum:

**Heilsuhjálparafelag Føroya** øðrumegin

og

**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið KAF** hinumegin

Í sáttmálanum partanna millum, sum fór úr gildi 1. oktober 2019, verða gjørdar hesar broytingar:

*Allastaðni har tað stendur heima-/heilsuhjálpari verður broytt til heilsuhjálpari-/heimahjálpari.*

**Sáttmálaskeið og lønarkarmur**:

Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober í 2019 til 30. september í 2021.

Tann 1. oktober 2019 hækkar mánaðarlønin á stig 2: kr. 750,-.

Upphæddin millum lønarstigini verður ásett til kr. 405,-

Tann 1. oktober 2020 kemur eitt nýtt lønarstig 12, og hækkar mánaðarlønin 2,25 %.

**§ 4. Løn**

Flokkingar:

| | |
|---|---|
| Heimahjálpari gongur stigini: | 2 til 7 |
| Heilsuhjálpari gongur stigini: | 7 til 12 |

**§ 5 Samsýning fyri ólagaliga arbeiðstíð**

Nýtt stk. 9. "Arbeiðið skal so vítt gjørligt skipast uttan brot í arbeiðstíðini. Har tað ikki letur seg gera, at skipa arbeiðið uttan brot í arbeiðstíðini, verða tímarnir sum liggja í vanligari tíð yrkadagar samsýntir smb. § 5, stk.1.

**§ 6 Viðbøtur**

Í Stk. 4 verða upphæddirnar broyttar soleiðis:

kr. 1.250,- broytt til kr. 1.500,-
kr. 750,- broytt til kr. 1.000,-

**§ 10. Frídagar**

Nýtt stk. 3. "Fellur ein frídagur eftir § 10 á ein dag, sum er frídagur smb. arbeiðsætlan, verður annar frídagur latin í staðin."

§ 10, stk. 3, verður broytt til § 10, stk. 4.



MA

**§ 12 Eftirløn**

Stk. 2 verður broytt soleiðis. "Fyri tímaløntar heima-/heilsuhjálparar, ið arbeiða færri enn 59 tímar um mánaðin rindar arbeiðsgevarin bundna eftirlønargjaldið, ið er ásett í § 2, stk. 1 í eftirlønarlógini (ll. nr. 49/2013).

**Tímaløntir heima-/heilsuhjálparar, § 20. Løn og arbeiðstíð**

Stk. 2 Um tímaløntur heima-/heilsuhjálpari hevur arbeitt meira enn 40 tíma viku, verður goldin úrtíðarløn, sum er 50 % eyka av vanligu lønini.

**Protokollat:**

Ásannandi, at stórur tørvur er á fleiri starvsfólkum – og eisini fleiri faklærdum starvsfólkum á eldraøkinum, ynskja sáttmálapartarnir at gera ávís átøk, fyri at bøta um støðuna á eldraøkinum.

Sáttmálapartarnir eru samdir um í sáttmálaskeiðinum at gera eina kanning av setanarviður-kiftunum hjá heima- og/heilsuhjálparum. Sáttmálapartarnir ynskja at kanna um grundarlag er fyri, at heima- og/ heilsuhjálparir kunnu verða settir í starv við hægri- , ella fullum setanarbrøki.

Sáttmálapartarnir eru samdir um at skipa fyri felags evnisdegi, har ljós verður varpað á m.a. setanarviðurskiftini og fakligheitina hjá heima- og/ heilsuhjálparum, sum starvast á eldraøkinum.

Úrslitið av kanningini verður lagt fram á evnisdegnum – og skipað verður fyri framløgum og kjaki fyri viðkomandi partar innan eldraøkið.

**§ 25 Gildikoma og uppsøgn**

Hesin sáttmáli er galdandi frá 1. oktober 2019 til 1. oktober 2021, og kunnu partarnir siga hann upp við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til tann 1. oktober 2021. Ásetingarnar viðvíkjandi § 5, § 6, § 10 og § 12, fáa gildi 1. apríl 2020.

Tórshavn 14. mars 2020

| | |
|---|---|
| *Vegna* | *vegna* |
| ***Kommunala Arbeiðsgevarafelagið KAF*** | ***Heilsuhjálparafelag Føroya*** |
| *Annika Olsen* | *Mary Antonsdóttir* |
| *forkvinna* | *forkvinna* |
| *Anita Fugløy* | *Marjun Petursdóttir Jensen* |
| *samráðingarleiðari* | *næstforkvinna* |



MA

ac